

# Radikalt sjálvstýri fór á dyr

**GREINING** Fólkaflokkurin stendur sambært stevnuskránni fyri radikalum sjálvstýri og einum liberalistiskum politikki á øllum økjum. Men í verki tykist hann at vera hálvhjartaður í stjórnarskipanararbeiðinum, verjir gamlar bygnaðir í fiskivinnuni og atkvøður ímóti málum um at verja persónliga frælsið hjá minnilutum. Er stundin komin hjá flokkinum at umskriva stevnuskránna, nú Poul Michelsen hevur sett orð á andsøgnina millum førda politikkin og stevnuskránna?

Uni Arge

Poul Michelsen, tingmaður, tveitti mánadagin eina politiska bumbu á redaktiónsborðini kring landið. Hann boðaði frá, at hann hevði tikið seg úr Fólkaflokkinum, tí hann vildi ikki longur finna seg í, at ein minniluti stýrir Fólkaflokkinum, og at flokkurin ikki virkar eftir síni egnu stevnuskrá. Í skrivi gjørdi hann greitt, at flokkurin sigur seg í stevnuskránni vera liberalan, sosialan og demokratiskan, verja demokratiska stýrislagið í Føroyum og tryggja persónliga frælsið hjá fólki. Haraftrat vil flokkurin, nevndi Poul Michelsen, at Føroyar skulu gerast suverenur statur millum aðrar í heiminum.

Men hesum virkar flokkurin sambært Poul Michelsen ikki fyri. Hann hevur í fleiri ár stríðst eitt innanhýsis stríð við serliga Bjarna Djurholm og Óla Breckmann, ið ikki júst hava verið kendir fyri at vera ídnir stríðsmenn á sjálvstýrisvonginum, heldur tvørturímóti. Eisini hava teir verið ímóti at endurskipað fleiri gamlar bygnaðir í samfelagnum, eitt nú í fiskivinnuni, har teir stuðla teimum valdsmiklu aktørunum, ið longu eru í vinnuni, og teimum fyrimunum, hesir aktørar fáa við verandi bygnaði. Hesin hugburður er konservativur og hoyrir ikki nútíðini til, hevur Poul Michelsen sagt, og tí tímdi hann ikki meira.

Veruligi valdsdysturin millum Poul Michelsen øðrumegin og Bjarna Djurholm og Óla Breckmann hinumegin stóð undan løgtingsvalinum 19. januar 2008. Øll sóu tá, at fremsta málið hjá Poul Michelsen var at koppa teimum báðum, og hann legði nógv fyri. Vallýsingarnar vóru bæði nógvar og stórar, og ongin ivi er um, at Poul Michelsen fór djúpt niður í lummum fyri at vinna valdystin. Tað eydnaðist eisini. Poul Michelsen varð valdur við 341 atkvøðum. Bjarni Djurholm fekk 317 atkvøður og Óli Breckmann 312. Hvørgin teirra kom á ting, men seinni fingu teir sess í tinginum sum eykavaldir, tí onnur fólkafloksfólk fóru í landsstýrið.

Væl ber til at siga, at sjálvstýrisvongurin í Fólkaflokkinum vann valið seinast, verður hugsað um, at Annika Olsen, Jógvan á Lakjuni og Jákup Mikkelsen, ið øll eru sjálvstýrishugað, komu á ting saman við Poul Michelsen. Men úrslitið gjørdist, at Óli Breckmann og Bjarni Djurholm, ið veljararnir vrakaðu, fingu eins stóra ávirkan, tá Jørgen Niclasen, Annika Olsen og Jacob Vestergaard fóru í landsstýrið. Hetta kom illa við hjá Poul Michelsen. Tá so Fólkaflokkurin fríggjadagin brádliga valdi Bjarna Djurholm í grein 25-nevndina, sum skal viðgera stjórnarskipanaruppskotið, var tað Poul Michelsen ovboðið, og hann takkaði fyri seg.

Á ein hátt er Fólkaflokkurin eitt sjáldsamt fyribrigdi. Hann sigur seg, eins og Poul Michelsen hevur víst á, vera liberalan og sjálvstýrishugaðan. Men hann er ikki so liberalur, at hann stuðlar minnilutabólkum, sum søguliga hava verið forfylgdir, hann stuðlar ikki eini reint liberalistiskari skipan í fiskivinnuni, har øll á jøvnum føti skulu gjalda fyri at fáa lut í fólksins ogn, fiskinum, og hann er so lítið sjálvstýrissinnaður, at hann setir ein meiri ella minni sambandshugaðan eykatinglim at viðgera stjórnarskipanaruppskotið og ikki sjálvan formannin, ið varðar av uttanríkismálum landsins.

Søguliga var Fólkaflokkurin ein samanrenning millum Vinnuflokkin og mongu veljararnar hjá Jóannesi Patursson. Hurðaklamsið hjá Poul Michelsen reisir spurningin, hvat er eftir av tí framfýsna sjálvstýrispolitikkinum hjá Fólkaflokkinum, sum Jóannes Patursson og eisini Thorstein Petersen vóru garantar fyri. Annfinn Kallsberg, ið var fullveldisløgmaður, er á veg úr politikki. Jørgen Niclasen, Jákup Mikkelsen og Heðin Zachariassen tosa sjáldan við nakrari sannføring um sjálvstýrispolitikk. Jógvan á Lakjuni er av heilum hjarta sjálvstýrissinnaður, men kortini ikki so sinnaður, at hann vildi endurveljast í stjórnarskipanarnevndina.

Vantandi sjálvstýrishugurin hjá stórum pørtum av Fólkaflokkinum hevur á valum kostað flokkinum nógv í sjálvstýrisháborgini, Havnini. Tjóðveldi hevur etið nógv burtur av Fólkaflokkinum í høvuðsstaðnum, og tær sjálvstýrisatkvøður, sum Tjóðveldi ikki hevði fingið fatur á har, átti Poul Michelsen. Hvussu verður so á einum komandi vali? Hvagar skulu høgrasinnaðir sjálvstýrisveljarar hjá Fólkaflokkinum fara, um teir ikki reiðiliga kenna seg heima í Tjóðveldinum, og Annfinn Kallsberg ikki stillar uppaftur? Spurningurin er upplagdur, men ikki einfaldur at svara.

Vist er kortini, at Fólkaflokkurin søguliga er ein seiglívaður flokkur, sum sjáldan fær teir stóru lúsingarnar frá veljarunum. Í veljarakanningum kann hann ofta liggja lágt, onkuntíð niðri á 16-17 prosentum, men tá til skarpskeringar kemur, endar hann vanliga á 19-20 prosentum. Um Bjarni Djurholm og Óli Breckmann hava styrkt sína støðu í flokkinum, nú Poul Michelsen loksins vendi teimum bakið, man tó vera ivasamt. Veljararnir valdu Poul Michelsen fram um teir báðar seinast, serliga orsakað av sjálvstýrismálinum, og í tí málinum er nú eitt tómt pláss í Fólkaflokkinum.

## Fakta

Í stevnuskránni hjá Fólkaflokkinum verður m.a. sagt:

»Hin føroyski Fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri) er ein liberalur, sosialur og demokratiskur sjálvstýrisflokkur. Endamál floksins er fult sjálvstýri fyri Føroyar, soleiðis at vit fáa lóggávuvald á øllum økjum og úteftir telja við sum suverenur statur javnbjóðis øðrum sjálvstýrandi londum.«